## Formula-deildin

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 07.05 | NSÍ-ÍF | Lassin Isaksen |
| 07.05 | Skála-GÍ | Páll Augustinussen |
| 07.05 | B36-EB/S | Petur Reinert |
| 07.05 | KÍ-HB | Jens Petur Brattalíð |
| 07.05 | VB/S-B68 | Dagfinn Olsen |

## 1. deild

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 06.05 | AB-KÍ | Lars Müller |
| 06.05 | FSV04-HB | Anton Skoradal |
| 06.05 | SÍ-TB | Regin Egholm |
| 06.05 | Royn-B71 | Rúni Gaardbo |
| 06.05 | VB/S-LÍF | Dan Højgaard |

## 2. deild

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 07.05 | GÍ-MB | Eugen Voda |
| 07.05 | B68-B36 | Bárður Mortensen |
| 07.05 | ÍF-Fram | Vinjard Dam |
| 07.05 | NSÍ-EB/S | Jan Gardar |
| 07.05 | KÍ-Skála | Hentza Johansen |

## 1. deild kvinnur

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 07.05 | AB-SÍ | Magnus í Króki |
| 07.05 | KÍ-B36 | Ingi Olsen |
| 07.05 | GÍ-EB/S | LÍF |
| 07.05 | NSÍ-HB | B68 |

STUTT SAGT

## Jónhard givið avboð til landsliðið

**Jónhard Frederiksberg hevur brotið lítlutá og má bíða eina viku ella tvær við at spæla. Skála manglar eisini aðrar spælarar til dystin ímóti GÍ, sum hevur allar tøkar uttan ein**

SKÁLA-GÍ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Álopsspælarin Jónhard Frederiksberg hevur roynt at treiskast ímóti einum skaða í lítlutá, men hetta vikuskiftið skal hann halda frí, og væntandi gongur minst ein vika afturat, áðrenn hann kann spæla aftur. Eitt lítið brot í lítlutá forðar fyri, at Jónhard kann spæla sum vant.

Hetta fekk eisini Jónhard at geva avboð til landsliðið, sum næsta vikuskiftið spælir dysti ímóti Póllandi. Landsliðsvenjarin hevði 19 spælarar við í hópinum, og enn hevur hann ikki boðað frá, at hann hevur tikið nakran avloysara út fyri Jónhard.

Borgar Kristiansen og Alexandur Johansen verða heldur ikki við Skála ímóti GÍ sunnudagin, og Pauli G. Hansen er heldur ikki heilt til reiðar, hóast hann er farin at venja spakuliga í vikuni.

Hjá GÍ hevur Hans Jørgen Djurhuus leikbann eftir reyða kortið ímóti NSÍ, meðan Áslakur R. Petersen, sum hevur havt ein skaða og var á beinkinum seinast, er heilt klárur aftur.

# Oddaliðið vil halda kósini

**Hjá B36 er saknur í fleiri stuðulsspælarum, men móti oddaliðnum eru neyvan ráð til umberingar av nøkrum slag**

B36-EB/STREYMUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kenna tey í B36 seg mest sum forfylgd av ringari eydnu fyri tíðina, so er hetta kanska ikki so løgið. Sunnudagin er satt oddabrak á skránni, tá fremsta Formula-liðið kemur á vitjan, men fortreytirnar hjá meistarunum kundu í øllum førum verið væl betri.

Alex José dos Santos og Fróði Benjaminsen eru báðir leikbannaðir. Ingi Højsted er úti fyri restina av árinum, og enn er Bergur Midjord ikki førur fyri at spæla, eftir at hann breyt fótin á landsliðsferðini til Florida. Teir fýra teljast uttan iva millum teirra, sum undir vanligum umstøðum verða roknaðir millum stuðulsspælarar á liðnum, og tí hevur Sigfríður Clementsen eina hampuliga stóra uppgávu, nú kortini skulu blandast.

### Vilja halda kósini

Hjá EB/Streymi tykist barometrið hinvegin bara peiggjað uppeftir. Seinasta vikuskiftið vunnu teir seg aftur upp á oddasessin, og tað vildi verið eitt stórt fet í so máta, um teir fara úr høvuðsstaðnum við øllum stigunum fyri aðru ferð í ár.

Einasti spælarin, sum ikki er tøkur til dystin, er Ólavur Poulsen, sum møguliga hevur brotið hondina. Í aðrar mátar nýtist Piotr Krakowski hvørki at hugsa um skaðar ella leikbann, og tí verður tað eitt lið í mest sum ideal-uppstilling, sum verður sent á vøllin í Gundadali sunnudagin.



*Vinnur EB/Streymur í Gundadali sunnudagin, kunnu teir veruliga leggja sjógv niður til verjandi meistararnar*

# Ungverji venur í Fuglafirði

**Hjá NSÍ telur einki annað enn trý stig, nú ÍF vitjar. Í Fuglafirði er tað góður styrkur, at Símun Eliasen er komin fyri seg aftur**

NSÍ-ÍF
*Jóannes Hansen*

ÍF hevur einki stig eftir seks tey fyrstu umførini. Viðhvørt hava teir staðið seg væl í Runavík. Eitt stig sunnudagin hevði komið ógvuliga væl við.

Hjálparvenjarin Símun Eliasen hevur verið burturi frá við brotnum armi. Í hesi vikuni hevur hann vant við fullari ferð, og Símun verður við sunnudagin. Tað verður mett sum góður styrkur.

Bartal Eliasen er leikbannaður. Í seks teimum fyrstu umførunum hevur hann fingið fimm gul kort. Málverjin, Karstin Joensen, er givin. Móti VB/Sumba var hann sjúkur. Tá vardi Emil Toftegård ÍF málið. Tað fer hann eisini at gera í Runavík. Karstin hevur borið seg undan at spæla, tí hann er so upptikin av arbeiði.

Í hesi vikuni hevur 22 ára gamalur ungverskur málverji verið í Fuglafirði og royndarvant. Tað er góður møguleiki fyri, at teir fara at gera avtalu við hann, um loyvini verða fingin upp á pláss.

### Nógvir skaðar

Móti GÍ vóru Arnhold Joensen og Julian Samuelsen skaddir. Julian verður við móti NSÍ. Tað verður Arnhold ikki. Dánial Pauli Højgaard kom sunnudagin aftur av arbeiðsferð uttanlands. Týskvøldið varð hann skaddur.

– Vit hava verið illa plágaðir av skaðum, og tað eru vit framvegis. Vit royna við tí fólkinum, sum vit hava. Um allir sýna rætta hugburðin og gera sítt ítarsta, so kunnu vit ikki rokna við meira, staðfestir ÍF venjarin Petur Simonsen, ið avgjørt heldur, at tað er møguleiki fyri at fáa stig í Runavík.

### Vilja vinna heima

Trygvi Mortensen hevur tjúgu spælarar at velja ímillum. Tann einasti, sum ikki er tøkur, er Helgi L. Petersen, sum framvegis er fótskaddur. Tað gongur rætta vegin hjá honum. Óli Hansen er tøkur aftur eftir leikbann móti GÍ. Viggo Johannesen fór út við skaða í Gøtu, men hann er tøkur aftur.

– Vit vóru ikki nøgdir við bara at fáa eitt stig í Gøtu. Á heimavølli mugu vit fáa fult hvørja ferð. ÍF hevur einki stig fingið, men vit undirmeta teir ikki. Teir hava ofta staðið seg væl í Runavík. Um okkara vísa rætta hugburðin og gera sítt ítarsta, so eiga vit at vinna øll stigini. Men tað er neyðugt at arbeiða og stríðast fyri teimum, sigur NSÍ venjarin Trygvi Mortensen.

## formuladeildin

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 11 | 6 | 5 | 15 |
| 2 KÍ | 6 | 4 | - | 2 | - | 0 | 14 | 5 | 9 | 14 |
| 3 B36 | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 9 | 6 | 3 | 13 |
| 4 GÍ | 6 | 3 | - | 2 | - | 1 | 12 | 7 | 5 | 11 |
| 5 HB | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 16 | 8 | 8 | 10 |
| 6 NSÍ | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 9 | 9 | 0 | 8 |
| 7 Skála | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 8 | 7 | 1 | 5 |
| 8 B68 | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 5 | 10 | -5 | 5 |
| 9 VB/S | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 5 | 19 | -14 | 3 |
| 10 ÍF | 6 | 0 | - | 0 | - | 6 | 6 | 18 | -12 | 0 |

**1. DEILD MENN**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 LÍF | 6 | 5 | - | 1 | - | 0 | 14 | 1 | 13 | 16 |
| 2 B71 | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 22 | 7 | 15 | 15 |
| 3 AB | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 14 | 5 | 9 | 13 |
| 4 FSV04 | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 13 | 4 | 9 | 12 |
| 5 SÍ | 6 | 3 | - | 0 | - | 3 | 19 | 14 | 5 | 9 |
| 6 TB | 6 | 3 | - | 0 | - | 3 | 8 | 11 | -3 | 9 |
| 7 KÍ | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 13 | 19 | -6 | 7 |
| 8 HB | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 16 | 17 | -1 | 4 |
| 9 VB/S | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 5 | 21 | -16 | 3 |
| 10Royn | 6 | 0 | - | 0 | - | 6 | 1 | 26 | -25 | 0 |